FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Postboks 208
110 Tórshavn

Stjórnarskrivstovan
15. apríl 2021
Mál: 21/00127-5
(at tilskila í svari)

Svar til § 52 a fyrispurning nr. 52-111/2020 frá Ingolf Sólheim Olsen, løgtingsmanni

Spurningar um fiskirættindi í bólki 3:

1. Hvørji skip hava veiðiloyvi í bólki 3 (í mars 2021)?
2. Hvørji skip høvdu hesi loyvi í 2009?
3. Hvør er søgan hjá tí einstaka veiðiloyvinum síðan 2009:
    a. Hvørji skip hava havt tey einstøku veiðiloyvini síðan 2009?
    b. Hvussu nógvir fiskidagar hava verið knýttir at teimum einstøku veiðiloyvunum hvørt árið síðan 2009?
4. Í hvørji løgtingslóg hevur Løgtingið samtykt, at óvirkin og tóm veiðiloyvi, ið hoyra til óvirkin skip, hava sama status sum virkin veiðiloyvi, sum hoyra til virkin skip, tá tað um rættindi ræður?
5. Hvørji saklig og viðkomandi atlit liggja til grund fyri at útluta fiskirættindi til tóm veiðiloyvi, sum hoyra til óvirkin skip?

Svar:

Til nr. 1.
Í skjali 1 er eitt yvirlit yvir rættindahavarar við rætti at fáa lut í fiskidøgum ásettir fyri bólk 3: Línuskip yvir 110 tons samsvarandi § 18, stk. 1, nr. 3 í sjófeingislógini.

Til nr. 2.
Í skjali 2 er eitt yvirlit yvir veiðiloyvi hjá línuskipum í 2009, sum er grundað á yvirlitið í skjali 3.

Til nr. 3a.
Í skjali 3 er eitt yvirlit yvir veiðiloyvi hjá línuskipum fyri tíðarskeiðið 1994/1995 til primo 2017. Línuskipini, sum í 2009 høvdu veiðiloyvi (skjal 2), eru litað við gulum. Við at fylgja broytingunum, sum eru skrásett í skjalinum, sæst, á hvørji møgulig onnur skip veiðiloyvi eftir 2009 eru flutt á. Yvirlitið er dagført fram til 1. februar 2017. Tey skipini, sum standa longst til høgru á hvørjum raði, høvdu veiðiloyvi primo 2017, ella tilskilað er, um tilsøgn er latin sambært § 8, stk. 4 í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Í skjali 4 er eitt yvirlit yvir veiðiloyvi í bólki 3, línuskip, við árslok 2017.

Veiðiloyvini fóru úr gildi 1. januar 2018. Tí er onki yvirlit yvir skip við veiðiloyvi árini 2018 og 2019. Talan var tá um rættindahavarar ístaðin. Við løgtingslóg um sjófeingi gjørdust veiðiloyvi aftur ein partur av lógarverkinum fyri føroyska fiskiveiði. Í skjali 4 er eitt yvirlit yvir rættindahavarar í mars 2021 við rætti at fáa lut í fiskidøgum ásettir fyri bólk 3: Línuskip yvir 110 tons samsvarandi § 18, stk. 1, nr. 3 í sjófeingislógini og tey skip, ið eru knýtt afturat hesum.

Til nr. 3b.
Í skjali 5 er eitt yvirlit yvir fiskidagar, sum hvørjum skipi hevur verið tillutað fiskiárini 2009/2010 til og við 2021. Sum heild eru tað skipini og dagatalið, ið er tillutað, tá fiskiárið byrjar, sum eru givin upp í skjalinum, men í einstøkum førum, har skip í einum fiskiári er skift út við eitt annað, er nýggja skipið nevnt ístaðin.

Til nr. 4.
Eg havi valt at svara spurninginum við stutt at lýsa viðkomandi ásetingar í løgtingslógini um vinnuligan fiskiskap (1994-2017), løgtingslógini um fyrisiting av sjófeingi (2018-2019) og í galdandi løgtingslóg um sjófeingi (2020-).

Í lógini um vinnuligan fiskiskap vóru rættindi at fiska latin eigara av ávísum fiskifari. Í skipanini vóru tvey sløg av loyvum: Veiðiloyvi og fiskiloyvi. Veiðiloyvi var góðkenning, ið var latin ávísum fiskifari at veiða. Veiðiloyvið fylgdi skipinum. Eitt skip kundi bert hava eitt veiðiloyvi, men fleiri fiskiloyvi. Fiskiloyvið var tann rættur, sum eigari av ávísum fiskifari við veiðiloyvi fekk at veiða ávíst fiskaslag á ávísari leið fyri eitt ávíst fiskiár.

Í lógini varð munur ikki gjørdar á øðrumegin óvirknum og tómum veiðiloyvum, ið hoyra til óvirkin skip, og hinumegin virknum veiðiloyvum, sum hoyra til virkin skip, tá tað um rættindi ræður. Einki lógarkrav var, um at skip við veiðiloyvi skuldi vera virkið fyri at fáa ella varðveita rættindini. Har var eingin brúksskylda. Heldur ikki var skylda at brúka tey rættindi, sum fiskifar við veiðiloyvi fekk útlutað í fiskiloyvið. Brúksskylda var bara knýtt at møguleikunum fyri at kunna avhenda egnar fiskidagar og egnar kvotur (60%-reglan).

Lógin um fyrisiting av sjófeingi (2018-2019) bar í sær, at rætturin at fiska varð loystur frá ávísum fiskifari. Veiðirættindini vórðu ístaðin útlutað ávísum persóni ella felag, sum síðani kundi velja, hvat fyri skip skuldi hava fiskiloyvi at troyta rættindini. Skipanin við veiðiloyvum varð avtikin.

Lógin hevði ásetingar um skyldu at brúka tillutað veiðirættindi, men hesar reglur fingu ongantíð virknað.

Eftir skiftisreglunum í lógini um fyrisiting av sjófeingi kundu tey, ið høvdu veiðirættindi undir lógini um vinnuligan fiskiskap, halda fram undir mestsum somu treytum sum frammanundan. Hetta var eisini galdandi fyri tey, ið eftir gomlu lógini høvdu tilsøgn um at varðveita veiðiloyvið í tvey ár, uttan at hava skip.

Eftir galdandi lóg um sjófeingi (2020-) eru veiðirættindi tengd at ávísum fiskifari við ávísum eigara. Eins og í lógini um vinnuligan fiskiskap eru nú aftur tvey sløg av loyvum: Veiðiloyvi

og fiskiloyvi. Rættindahavarar fingu eina tíð at laga seg til nýggju skipanina, men skulu í seinasta lagi 1. januar 2022 hava knýtt síni rættindi at egnum fiskifari, sum fær veiðiloyvi.

Í tillagingartíðini fram til 2022 kann rættindahavari velja at brúka egið fiskifar ella fiskifar, sum viðkomandi ikki eigur. Verður fiskiloyvi útskrivað til egið fiskifar, fær hetta fiskifarið veiðiloyvi, um tað ikki longu hevur veiðiloyvi, og rættindi verða knýtt at fiskifarinum.

Eftir 1. januar 2022 eru veiðirættindini knýtt at ávísum fiskifari við veiðiloyvi. Skulu rættindi brúkast við øðrum fiskifari, kann tað bert gerast eftir lógarásetingunum um at flyta veiðiloyvi, kvotur ella fiskidagar.

Samanborið við lógina um vinnuligan fiskiskap eru treytirnar fyri at fáa veiðiloyvi herdar við galdandi lóg. Ein treyt er, at skipaeigarin skal hava ræði á rættindum at veiða, og hesi rættindi skulu vera knýtt at tí ávísa fiskifarinum í fiskiloyvi. Hetta ger, at tað ikki ber til at hava tóm veiðiloyvi í skipanini.

Nevnast skal eisini, at eftir galdandi lóg er brúksskylda á veiðirættindum frá 1. januar 2022.

Til nr. 5.
Í lógini um vinnuligan fiskiskap (1994-2017) var eingin treyt, at veiðiloyvi skuldi hava fiskirættindi knýtt at sær, ella at skip skuldi vera virkið fyri at fáa útlutað fiskirættindi.

Sum víst á í svarinum til spurning 4, skal rættindahavari í seinasta lagi 1. januar 2022 hava knýtt síni rættindi at egnum fiskifari, sum fær veiðiloyvi. Í tillagingartíðini er ikki lógarkrav, at skip skal hava veiðiloyvi fyri at fáa útlutað fiskirættindi.

Tá tillagingartíðin er farin, og rættindi skulu vera knýtt at fiskifari við veiðiloyvi, fer ikki at bera til at hava "tóm veiðiloyvi", tí sum nevnt, er ein treyt fyri at fáa veiðiloyvi, at rættindahavarin hevur ræðið á rættindum at veiða, og hesi rættindi verða knýtt at tí ávísa fiskifarinum í fiskiloyvi. Reglurnar um brúksskyldu bera í sær, at óvirkin veiðirættindi falla aftur til landið.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður